# Nýmótans borgarin setur nýmótans krøv

BÁRÐUR KASS NIELSEN
www.bardur.blog.com
Valevnislisti B,
Runavíkar kommuna



Runavíkar kommuna er vaksin nógv tey seinastu árini. Í dag eru tað tilsamans 3.700 íbúgvar í kommununi. Skattainntøkurnar eru tey seinastu trý árini øktar við 27% og nógvir nýggir kommunalir, privatir og vinnuligir bygningar eru í gerð. Ein kommuna í stórari menning og við stórum potentiali. Eitt náttúrligt miðstaðarøki, bæði geografiskt, vinnuligt og mentanarligt.

Tað verður nógv tosað um at fáa føroyingar heimaftur á klettarnar at búgva eftir lokna lestrartíð. Hetta er eitt aðalmál í vísión 2015. Endamálið við hesum er, at skapa betri karmar fyri víðari menning av samfelagnum. Mett verður, at hesi fólk kunnu vera við til at fjøltátta og styrkja nýggjar vinnugreinar, so at samfelagið í framtíðini vil hava fleiri streingir at spæla uppá. Við hesum vildu inntøkur landsins verið minni tengdar at eini ávísari vinnu, og sostatt javnvigað partar av teimum sveiggjum, sum hevur eyðmerkt føroyska búskapin seinastu nógvu árini.

Ein slík menning av samfelagnum er ikki bert ein uppgáva fyri landsins politikarar, men eins nógv ein uppgáva fyri kommunalu politikkarnar. Tað er jú í kommununum, at borgarin skal búgva og trívast.

Eitt aðalmál hjá nývaldum býráðslimum eigur tí at vera, at skapa trivnað í kommununi, fyri at kommunan skal lúka tey krøv, sum ein nútímans borgari setur. Hesi krøv eru m.a.:

• fjølbroyttir bústaðarmøguleikar til ymiskan tørv,
• ansingartrygd hjá barnafamiljum,
• skúlaverk, sum er á jøvnum støði við onnur norðurlond,
• fjøltáttaðir og nýmótans karmar til mentanarlig og ítróttarlig tiltøk,
• nýhugsandi og fjølbroyttir starvsmøguleikar.

Um vit vilja náa hesum málum, er tað týdningarmikið at vit raðfesta rætt og gera málini greið. Vit skulu fylgja upp uppá málini, inntil vit hava nátt tí sum verður stungið út í kortið.

Búskaparliga rembingin á altjóðamarknaðinum skapar økt krøv til fíggjarstýringina í komununi. Eisini vilja herdu reglarnir um innrapportering av roknskapartølum til fíggjarmálaráðið økja um arbeiðsbyrðina hjá komandi býráðslimum. Kommunupolitikkur stendur yvirfyri eini spennandi og avbjóðandi tíð, og tí bjóði eg meg fram at taka ímóti hesum avbjóðingum.

# Ítróttur og at seta sær nýggj mál

STEINFINNUR MITTELSTEIN
- eri at finna á lista B



**Sum partur av ítróttinum í Gundadali, so eiga vit sjálvsagt at fegnast um kring umstøðurnar. Men vit muga ikki steðga her**

Eg vil virka fyri at niðari- og ovarivøllur blíva altjóða gjørdir, so havnarfeløgini kunna bjóða fremmandum liðum til dyst, við karmum, ið hava altjóða støði. Hettar arbeiðið er byrja, men tað skal ikki steðgast her.

Vallirnir skula gyrast inni, so vit hava fýra inngongdir. Hettar ger at Ovarivøllur fær altjóða viðurkenning, so vit betur kunna halda høgt støði, eins og okkara áskoðarar kunna kenna seg tryggar at fara til dyst. Hettar kemur eisini at gera tað munandi lættari at krevja inn til dystir í okkara heimligu kapping. Hettar er til gagns fyri feløgini í Havn.

Hettar merkir ikki, at okkara ungdómur ikki sleppur at spæla og stuttleika sær á vallunum í Gundadali, tá ongir dystir eru. Økið skal framvegis vera opið fyri øllum, júst sum tað er í dag.

Eisini kring umstøðurnar til tennis er nóg góðar. Hendan ítróttin var í menning fyri nøkrum árum síðani, men meira fer má setast á hendan ítróttin. Eg trúgvi uppá at um vit betraðu umstøðurnar, so tennisleikararnir høvdu møguleika at koma undir tak, fingið eitt prát og eitt brúsubað aftaná venjin, hevði økt um áhugan fyri tennis, og harvið ment hendan ítróttin.

Hølisviðurskiftini hjá ÍSF og sersambondunum eru út av lagi vánalig. Vit eiga at umhugsa at taka FSF húsið niður, flyta ÍSF og sersambondini í størri og betri hølir. Síðani skal gerast pláss fyri at byggja svimjihøllina út vestureftir, so vit kunna bjóða okkara svimjiítrótti betri karmar at venja undir. Her hugsi eg um ein 50 metur langan hyl.

Sum virkin innan ítróttin í mong ár, so kenni eg hettar; at flyta seg, seta nýggj mál og fara eftir teimum.

Saman við ítróttinum, vil eg seta nýggj mál og fara eftir teimum.

# 300 atkvøður til hægstbjóðandi

MAGNUS GAARD
formaður í Róðrarfelagnum Knørri



**– áheitan á býráðsvalevni í Tórshavnar kommunu viðvíkjandi Róðrarfelagnum Knørri**

Nú stundar til býráðsval. Myndirnar av háttvirdum býráðspolitikarum gerast fleiri og feiri í miðlunum, og nakað er kanska at reypa um hjá teimum, ið hava sitið við valdið. Vit fingu Tórsbreyt fyri stuttum. Tað er eitt veldugt framstig fyri ítróttina í Havnini. Sement fór eisini í formarnar, sum gjørdust til ein spegilsvendan dansisal, og Tórshavnar býráð hevur yvirtikið høllina, sum leingi hevur verið um at kvalt badmintonítróttina í býnum. Stutt sagt, so eru hend frambrot á ítróttarøkinum í Tórshavnar kommunu. Men sjálvandi, Rom varð ikki bygdur eftir einum degi, og treyðugt so, tað restar nógv í, áðrenn øll ítróttafeløgini í býnum hava sømilig kor at virka undir.

Eitt av ítróttafeløgunum, ið alsamt gerst ein virknari og sjónligari partur av ítróttinum í Havnini, er Róðrarfelagið Knørrur. Við Lágu kai á Skálatrøð hevur hetta róðrarfelag seinastu 24 árini spakuliga vaksið seg størri og størri og hevur nú allar bátastøddir. Fimmmannaførini Jallin og Tambar, seksmannafarið Jarnbard, áttamannafarið Knørr og tíggjumannafarið Ormin Langa, ið saman við bátunum hjá hinum róðrarfeløgunum í býnum hava stóran týdning fyri tjóðarítróttina í Føroyum. Uttan Jarnbard og Gongurólv høvdu seksmannafør við kvinnum verið deyð í 2008. Og Ormurin Langi og Havnarbáturin syrgdu einsamallir fyri einum av mest spennandi FM-kappingum nakrantíð hjá tíggjumannaførum. Hesum kunnu havnarborgarar vera sera stoltir av, men fá geva sær far um, hvussu ymiskar umstøður hesi bæði feløgini í Havn virka undir.

Havnar róðrarfelag hevur síðan fyrst í 70´unum havt avbera góðar umstøður. Bátarnir standa turt og væl. Ungdómurin, sum íðkar í Havnar róðrarfelag, kann fáa sær eitt brúsubað eftir lokna venjing, og felagshøli eru til annað virksemi so sum inniróður, veitslur, nevndarfundir og annað. Hattin av fyri Havnar róðrarfelag. Tey hava verið ófør yviri í Álakeri. Í Róðrarfelagnum Knørri hava vit framvegis bara tað gamla, lítla, váta neystið við Lágu kai á Skálatrøð. Hví hetta framvegis er so, skjótt 25 ár eftir at Róðrarfelagið Knørrur varð stovnað, fari eg ikki at gera meg klókan uppá her. Men eitt er vist, vit hava ongan góðan í Tórshavnar býráð. Tað vísir seg altíð so, at um ein ella fleiri limir í Býráðnum veruliga vilja arbeiða fyri eini sak, so lukkast tað eisini at fáa sakina á skinnarar. Vit hava ongan sovorðnan í Tórshavnar býráð. Okkara støðugu áheitanir á býráðslimir um í øllum førum bara at viðgera okkara støðu og at seta okkum okkurt í útlit, hava higartil verið púra úrslitaleysar.

Nú hevur so Petur í Gong á tjóðveldislistanum týðiliga givið til kennar at hann er sinnaður at arbeiða fyri einari loysn neystatrupulleikanum hjá Róðrarfelagnum knørri. Petur er ein skilagóður maður, og tað er skilagott at stuðla ítróttini í býnum av fleiri orsøkum. Petur er eisini skilagóður, tí tað eru í minsta lagi 300 atkvøður at heinta í Róðrarfelagnum knørri. Felagið er vorðið stórt seinastu árini, og tað eru nógv fólk, ið eru góð við Róðrarfelagið Knørr. Tey eru øll forsyndað inná støðuna, sum felagið er í, og tey fara at atkvøða fyri einum valevni við trúðvirði sum vil fara inn í býrráðið at arbeiða fyri einari loysn á neystatrupulleikunum hjá Róðrarfelagnum Knørri.

# Dupultspælið hjá Kaj Leo og Helenu

SJÚRÐUR SKAALE



**Kaj Leo og Helena siga seg vilja virka fyri, at føroysk ítróttarfólk sleppa til OL. Men tey spæla dupultspæl. Tí tey vilja ikki gera tað, sum skal til. Tey vilja ikki taka fullveldi**

Farnu mánaðirnar hevur kjakið um europapolitikk sett dagsskránna. Vit vilja vera við í EFTA og í europeiska búsaparliga samstarvinum, EBS. Okkara vinnulív skal hava atgongd til stórar marknaðir.

Hetta hava vit roynt í mong ár. Vit hava bankað á so nógvar hurðar, at knúgvarnir bløða. Men vit fáa sama svar hvørja ferð: Føroyar eru vælkomnar við - men treytin er føroyskt fullveldi!

**OL**
Mánakvøldið var ein frálíkt tiltak í úvarpshøllini. ÍSF spurdi hvussu menna vit okkara størstu talent innan ítrótt.

Svarini vóru mong og ymisk - men eitt vóru øll samd um: Tað er heilt avgerandi, at føroysk ítróttarfólk sleppa at umboða Føroyar á olympisku leikunum.

Hesum lovaði Helena Dam á Neystabø at virka fyri. Hesum lovaði eisini Kaj Leo Johannesen at virka fyri.

Men tey vita bæði, at vit hava roynt hetta áður. Tey vita bæði, at vit fleiri ferðir hava fingið sama svar frá Olymisku Nevndini: Føroyar eru vælkomnar við - men treytin er føroyskt fullveldi!

**Politiskt dupultspæl**
Tað er ikki rætt at blanda partapolitiskar ósemjur upp í spurningin um korini hjá okkara úrvalsítróttarfólki.

Men at siga at fullveldi er treytin, er ikki partapolitikkur. Tað er fakta.

Og tá formaðurin í einum flokki, hvørs fremsta mál er at vit ikki skulu hava fullveldi sigur, at hann vil virka fyri føroyskum OL-limaskapi, so er talan um politiskt dupultspæl.

Sannleikin er, at bæði Helena og Kaj Leo standa fyri einum politikki, sum steingir føroysk ítróttarfólk úti frá olympiskari luttøku.

Á júst sama hátt sum teirra støða í besta føri ger tað sera, sera trupult at fáa atgongd til europeiskt samstarv - og í ringasta føri ger tað ómøguligt.

# Roynið nú at fáa tónleikinum og mentanini góðar og sømiligar sømdir!

FRÍÐÁLVUR JENSEN



**Vit hoyra upp ísaman, at nú skal FØROYAR brandast við tí, sum okkara framúrskarandi tónleikarar og mentafólk fáa úr hondum**

Meina vit nakað við hetta, ella er hetta bara ein smidligur valmøguleiki og kann hetta geva nakrar kærkomnar atkvøður?

Vit eru troytt av hesi strembanini bara eftir maktini – nú vilja vit síggja, at úrslitini fara at standa mát við lovorðini.

**Musikkskúlin**
Nær fara vit at síggja, at ein veruligur nýggjur musikkskúli fer at standa á dagsskránni, og nær fara tey mongu, sum standa á bíðilista, at fáa ein møguleika?

Lat okkum fáa eina nágreiniliga dagfesting?

**Tit mugu bjóða av!**
Í dagsins avbjóðingum og tí sum vit royna at seta okkum fyri, er tað neyðugt, at vit veljarar fáa sett nøkur ítøkilig útlit, so vit kunnu seta krossin við tann, sum kemur við besta boðnum – "that´s it".

Gott val – øll somul!